MÁLRÁÐIÐ

øll eiga málið

ÁRSFRÁGREIÐING 2022

***Inngangur*** ........................................................ **3**

***Endamál*** ........................................................ **5**

***Limirnir í Málráðnum*** ........................................................ **6**

***Starvsnevndin*** ........................................................ **8**

***Málstovan*** ........................................................ **8**

***Ráðgeving*** ........................................................ **9**

***Fundir í Málráðnum*** ........................................................ **10**

***Nýggj orð*** ........................................................ **11**

***Stavsetingarorðabókin*** ........................................................ **12**

***Hendingar í 2022*** ........................................................ **13**

***Roknskaparárið 2022*** ........................................................ **14**

***Inngangur***

2022 hevur verið eitt spennandi og hendingaríkt ár hjá Málráðnum, sum nú hevur sitið í hálvt annað ár. Í ráðnum eru 11 limir, harav 5 sita í starvsnevndini. Ein týðandi uppgáva hjá starvsnevndini er at vera millumliður millum breiða Málráðið og málstovuna, ið er dagliga avgreiðsla og skrivstova Málráðsins. Eisini fylgir og stýrir starvsnevndin regluliga arbeiðinum á málstovuni. Í 2022 hevði starvsnevndin 9 fundir, og alt Málráðið hevði 3 fundir.

Á fíggjarlógini fyri 2022 hendi tað gleðiliga, at formaðurin frá 1. januar 2022 fekk fasta mánaðarliga samsýning, og at starvsbrotið á Málstovuni fór úr 1,5 til 2,0. Hetta fegnast vit um, tí arbeiðsbyrðan og tørvurin á dagføringum av ymsum slag eru stór. Ein partur av meirjáttanini fer og er farin beinleiðis til dagføring av umsiting og skrivstovuhaldi, soleiðis at vit sum almennur myndugleiki og stovnur fáa røkt okkara skyldur viðvíkjandi skráseting, fáa førleika og møguleika at veita alment innlit, sýna góðan fyrisitingarsið, hava skilaliga fíggjarumsiting og brynja okkum til framtíðina. Júst framtíðin setur nevndu skyldum og førleika økt krøv, og málfakligu krøvini í einum støðugt meiri talgildum og alheimsgjørdum veruleika gerast ikki færri – heldur tvørturímóti. Vit vilja og noyðast at ganga teimum á møti, og tað gera vit við einum sterkum, virkisfúsum og sjónligum Málráði. Við hesi hugsjón í huga gjørdu vit av, at økta starvsbrotið skuldi nýtast til at skipa fyrisiting á Málstovuni. Í heyst settu vit eitt fólk í tíðaravmarkað verkætlanarstarv, har ið arbeiðssetningurin m.a. var at fáa Málráðið upp í Skjalhald og fyrireika fasta starvið. Í ár gleða vit okkum at kunna lýsa starvið leyst at søkja.

Á fíggjarlógini vóru 100 000 kr. í játtanini oyramerktar til teknmál, ið Málráðið eisini varðar av. Vit hava lagt nógva orku í at finna út av, hvussu tørvurin hjá føroyskum teknmálsbrúkarum og aðalendamálið hjá Málráðnum umskarast. Úrslitið gjørdist orðabókagerð, og valdu vit tískil at stuðla verkætlanini *SignWiki Føroyar*, ið er talgild teknmálsorðabók, við lønarútreiðslum. Tað arbeiðið var steðgað upp, tí játtanin var brúkt, men nú verður tað tikið upp aftur og ment. Ynskið er, at játtanin er varandi, og at arbeiðið at geva teknmálsbrúkarum og teimum, sum eru áhugað í teknmáli, orð og/ella tekn, soleiðis at tey eisini fáa samskift á føroyskum.

Ein aðaluppgáva hjá Málráðnum er at ritstjórna og greiða til útgávu føroyska stavsetingarorðabók, sum landsstýrismaðurin løggildar. 2022 hevur verið merkt av málsligum viðgerðum sum liður í

arbeiðinum við *Stavsetingarorðabókini.* Arbeiðið við *Stavsetingarorðabókini* gongur væl. Ritstjórin hittist regluliga við fylgibólkinum og er saman við formanninum og næstformanninum í ferð við at fyrireika rættlesturin, ið fer av bakkastokki í ár. Í sambandi við, at arbeiðið nú nærkast endanum, eru vit eisini í eini tilgongd, har ið vit fyrireika útgávuna, m.a. við at arbeiða við okkara talgildu pallum og samleika.

Sum Málráð vilja vit áhaldandi at arbeiða fyri, at Málráðið hevur fingurin á pulsinum og veit, hvat rørist millum føroyskar málbrúkarar. Hetta er ein stór uppgáva, ið vit sum Málráð ikki megna at lyfta einsamøll. Tískil eru vit til reiðar at styðja og stimbra øll átøk, sum gagna føroyska málinum. Harumframt eru vit eisini til reiðar at samstarva um at bera okkara mál inn í framtíðina og soleiðis varðveita føroyskt sum samfelagsberandi mál í Føroyum. Ábyrgdin hvílir á okkum øllum at geva komandi ættarliðum møguleikan at leggja heimin undir seg á føroyskum máli. Hetta krevur áræði, nærlagni og áhaldandi vælvild og játtan frá politiska myndugleikanum.

Hetta er tíggjunda ársfrágreiðing, ið Málráðið letur úr hondum síðan stovnanina 1. januar 2013. Ársfrágreiðingarnar eru at finna á heimasíðu okkara málráð.fo.

*Málráðið, 12. januar 2023*

*Helena Kannuberg, formaður*

***Endamál***

Málráðið hevur sum endamál at røkja, menna og verja føroyska málið, at vegleiða, ráðgeva og gera niðurstøður í málspurningum og at áseta føroyska stavseting. Málráðið skal harumframt serskilt røkja, menna og verja føroyska teknmálið. Málráðið savnar og skrásetur nýkomin orð, máliskur, framburðir og onnur málslig fyribrigdi í føroyskum og er til hjálpar at velja og evna til nýggj orð. Sama er eisini galdandi fyri føroyskt teknmál.

Málráðið gevur landsstovnum og almenningi vegleiðing, ráð og upplýsing í spurningum um føroyskt mál í talu og skrift eins og um føroyskt teknmál, sí meir um hetta á s. 16. Almennir myndugleikar eiga í størst møguligan mun at fylgja niðurstøðunum hjá Málráðnum.

Málráðið eigur at samstarva við fjølmiðlar, stovnar og almennar myndugleikar, ið hava stóra málsliga ávirkan. Í sambandi við yrkisbólkar skal Málráðið menna gott føroyskt yrkismál og annars skipa fyri átøkum málinum at frama.

Málráðið ritstjórnar og greiðir til útgávu føroyska stavsetingarorðabók, sum landsstýrismaðurin løggildir. Almennir myndugleikar hava skyldu at fylgja ásetingunum í stavsetingarorðabókini.

Málráðið er málrøktar- og málmenningarstovnur, skipaður undir landsstýrinum og í virksemi sínum óheftur av politisku skipanini.

***Limirnir í Málráðnum***



***Helena Kannuberg****, forkvinna*

MA í føroyskum, eftir tilmæli frá Føroyamáli



***Eyðun á Borg***

Lærari, eftir tilmæli frá landsstýrismanninum



***Randi Kúrberg****, næstforkvinna*

MA í føroyskum, eftir tilmæli frá Námi



***Meifríð Weihe Hansen***

Heilsurøktari, undirvísir í teknmáli, eftir tilmæli frá landsstýrismanninum



***Johan Blábjørg***

Fríyrkis teknmálstulkur, undirvísir í teknmáli, eftir tilmæli frá Deyvafelagnum/Felagnum HOYR



***Theodor Eli Dam Olsen***

Teologur, prestur, eftir tilmæli frá Javnstøðunevndini



***Rakul Skaale Andreasen***

MA í føroyskum, eftir tilmæli frá Fróðskaparsetri Føroya



***Elin Henriksen***

Týðari, eftir tilmæli frá Móðurmálslærarafelag Føroya



***Heri Jógvan Joensen***

Teologur, prestur, eftir tilmæli frá Navnanevndini



***Bergur Rasmussen***

Lærari, eftir tilmæli frá Rithøvundafelag Føroya



***Lena Reinert***

Vísindaligt hjálparfólk á Føroyamálsdeildini, BA í føroyskum, eftir tilmæli frá Staðarnavnanevndini

***Starvsnevndin***

Starvsnevndin er mannað við hesum limum í Málráðnum: Helenu Kannuberg, forkvinnu, Randi Kúrberg, næstforkvinnu, Rakul Skaale Andreasen, Theodor Eli Dam Olsen og Elini Henriksen.

***Málstovan***

Málstovan er skrivstovan hjá Málráðnum, og har starvast:



***Kristin Magnussen****, málfrøðingur*

kristin@malrad.fo, 312397



***Ragnar Sigrunarson****, málsligur ráðgevi og samskipari*

ragnar@malrad.fo, 312397

***Ráðgeving***

Málstovan veitir stovnum og einstaklingum málsliga leiðbeining. Øll eru vælkomin at skriva til málstovuna á malrad@malrad.fo ella at ringja á 312397. Málstovan heldur til í Reinshúsi, Handan Á 5, í Havn.




Telefontíðirnar hjá Málstovuni eru mánadag-hósdag kl. 10-12, og skrivstovan er opin hvønn gerandisdag kl. 9.00-15.00

***Spurningar***

237 spurningar vórðu svaraðir í 2022, og hetta er næstan neyvt tað sama sum í 2021, tá 238 spurningar vórðu svaraðir. Tó var býtið millum sløgini javnari í 2022 enn í 2021, tá ið mest sum allir spurningarnir snúðu seg um týðing.




Í 2022 snúðu 19 % av spurningunum seg um stavseting, 12 % um mállæru, 21 % um málbering, 44 % um týðing, og 3 % snúðu seg um annað.

Flokkingin *týðing* fevnir um alt frá yrkisorðum til, hvussu bókarheiti kunnu umsetast. Í flestu førum verður orðasmíð flokkað undir *týðing*, av tí at tað snýr seg um at finna eitt føroyskt nýyrði fyri útlendskt hugtak. Spurningar snúgva seg ofta um bæði týðing og stavseting, t.d. um spurt verður, hvussu vit á føroyskum siga 'season/sæson' í sjónvarpsrøðum. Spurningurin snýr seg í útgangsstøðinum um týðing, men endar sum ein spurningur um stavseting og bending (vit siga *sesong*, og tað bendist sum *bygd*).

Tað eru leik og lærd, ið seta Málstovuni spurningar. Miðlar spyrja: **Kunnu vit brúka orðið *hybridkríggj*?** Ja. **Hvussu siga vit 'fast track-skipan'?** Tað er *snarskipan*, og tað er at rokna sum stytting av *snarbreytarskipan*. 'Fast track' er *snarbreyt*. Almennir stovnar spyrja: **Hvussu siga vit**

**‘automatiktekniker i elektrobrancen’?** Tað er *automatikktøkningur í elektrovinnuni*. **Kann orðið *foreldur* vera eintal í lógarmáli?** Ja, *foreldrini*, *foreldrið*. Rættlesarar spyrja: **Er tað í lagi at skriva “fyri eina ferð skyld”?** Ja, tað er í lagi, sbr. *fyri tann skyld* (el. *skuld*). Fyritøkur spyrja: **Hvussu eitur ‘warning deadline’?** Tað eitur *áminningarfreist*. Fólk spyrja: **Hvussu bendist *surimi*?** *Surimi* bendist sum *battarí*, umframt at r-ending er í lagi í fleirtali hvørfalli og hvønnfalli, og *surimiinum* er í lagi í hvørjumfalli eintali. Flestu spurningar koma við telduposti frá stovnum og fyritøkum, men øll eru vælkomin at skriva og ringja til Málstovuna.

Ikki allir spurningar, ið verða settir Málstovuni, verða svaraðir, av tí at arbeiðsorkan á stovninum er sera avmarkað. Tørvurin á málsligari ráðgeving er stórur og støðugt vaksandi. Serliga málamótið við enskt og danskt krevur áhaldandi, at føroysk nýyrði verða gjørd, og at tøkuorð verða lagað til føroyska bending og stavseting. Hesin tørvurin er sjónligastur í nógvu spurningunum um týðing.

Málráðið hevur í útivið eitt ár virkað fyri at fáa journalskipanina Skjalhald, og henda skipanin fer at gera tað gjørligt at føra neyv hagtøl yvir, hvørjir spurningar verða svaraðir, og hvørjar spurningar málstovan tíverri ikki náddi at avgreiða tað árið. Skjalhald fer tó sum partur av nýskipaðu fyristingini at geva málstovuni eitt greiðari yvirlit yvir málsligu spurningarnar og harvið at loyva starvsfólkunum av svara fleiri spurningum í framtíðini.

***Fundir í Málráðnum***

Í 2022 vóru tríggir fundir í Málráðnum: 16. juni, 22. septembur og 10. novembur. Síðani februar í 2022 hava limirnir í starvsnevndini og Málráðnum fingið fundarfrásøgnina til viðmerkingar innan tríggjar yrkadagar eftir, at fundur hevur verið. Limirnir í Málráðnum fáa eisini frásagnirnar frá fundunum í starvsnevndini, tá ið tær eru góðkendar. Hetta verður gjørt, fyri at allir limir í Málráðnum skulu verða kunnaðir um virksemið á málstovuni og í starvsnevndini, og fyri at málráðslimirnir skulu kunna gera vart við seg, um teir hava viðmerkingar til mál og evni, sum eru til viðgerðar í starvsnevndini.

Á fundinum í juni varð sjøtul settur á orðaskiftið um, hvussu vit á føroyskum skulu stava tøkuorð, ið verða borin fram við [ai] uttan mun til málføri. Jógvan í Lon Jacobsen, professari í føroyskum máli á Føroyamálsdeildini, og málsligi ráðgevin hjá Málráðnum høvdu eina samrøðu, sum lýsti grundgevingar fyri og ímóti ymiskum loysnum. Síðani var orðið frítt, og málráðslimirnir løgdu síni sjónarmið fram. Málið varð fyrireikað í starvsnevndini framman undan málráðsfundinum.

Á fundinum í septembur varð málið um [ai] aftur til viðgerðar. Harumframt var Hanna Simonsen, sum er verkætlanarsett at skipa fyrisiting á Málstovuni, og kunnaði seg fyri málráðslimunum. Verkætlanin ber í sær, at Málráðið verður partur av Landsneti og Skjalhaldi. Endamálið við verkætlanini er at fáa yvirlit yvir skrivstovu- og fyrisitingararbeiðið á málstovuni. Ein partur av tí at fara upp í Skjalhald er at fyrireika og skipa mannagongdir, skráseta og savna saman viðtøkur og talgilda gomul skjøl. Tað er umráðandi, at verandi og komandi starvsfólk koma til arbeiðis á einum stovni við væl virkandi mannagongdum og skipanum, sum altíð kunnu betrast og dagførast, tí tær verða umsitnar við yvirliti, skili og fyrivarni. Tá ið verkætlanin er lokin, verður eitt fólk eftir ætlan sett í fast hálvtíðarstarv á málstovuni at varða av skrivstovu og fyrisiting. Eisini varð Málráðið kunnað um, at tað eydnaðist at seta teknmálstulkarnar Edny Poulsen og Eyðgunn Hansen í verkætlanarstarv at dagføra teknmálsorðabókina *SignWiki Føroyar*. Hetta varð gjørt fyri játtanina upp á 100 000 kr. til at menna føroyskt teknmál.

Á fundinum í novembur varð endaliga atkvøtt um [ai]. Samtykt varð, at tøkuorð, ið verða borin fram við [ai] uttan mun til málføri, verða skrivað við *ei*. Tó kunnu orð við *ai*, ið longu eru í málinum, framhaldandi verða skrivað við *ai*. Samtyktin merkir, at t.d. hesi orð skulu skrivast við *ei*: *beisa,*

*feia, feira, keisari, meiarí, peila, postei, preia, sjeikur, skeilett, spei(gi)pylsa, speila, sveisa, bei, heipa* (en. *hype*)*, leika* (en. *like*)*, neis* (en. *nice*)*, neilon, sleisa, sveipa* (en. *swipe*)*, teima* (en. *time*)*, veirur*. Og at t.d. hesi orð kunnu skrivast við *ei* ella *ai*: *heiku/haiku, kei/kai, mei/mai, meis/mais, samureiur/samuraiur*.

***Nýggj orð***

Hesi orð vórðu løgd aftur at Nýggjorðalistanum í 2022:

| | |
|---|---|
| **vindkøling** *kv* | da. *vindkøling*, en. *wind chill* |
| **kuldavísital** *h* | da. *kuldeindeks*, en. *wind chill factor* |
| **hitavísital** *h* | da. *hedeindeks*, en. *heat index* |
| **ábær ferðsla** *kv* | da. *blød trafik* |
| **útljóðsherðing** *kv* | da. *udlydshærdning*, en. *final obstruent devoicing* |
| **førismismunur** *k* | en. *ableism*, se. *funkofobi* |
| **stimburkoppseting** *kv* | en. *booster vaccine* |
| **endurkoppseting** *kv* | en. *revaccination* |
| **hybridkríggj** *h* | en. *hydridkrig*, en. *hybrid warfare* |
| **albúgving** *kv* | da. *almendannelse* |

Summi av orðunum vóru til frammanundan, t.d. *albúgving*, og onnur eru nýyrði frá málstovuni, t.d. *ábær ferðsla* og *stimburkoppseting*.

***Stavsetingarorðabókin***

*Stavsetingarorðabókin* er orðabók, sum Málráðið ritstjórnar og gevur út, og sum landsstýrisfólkið í mentamálum løggildir. Hetta merkir, at allir almennir stovnar hava skyldu at fylgja ásetingunum í *Stavsetingarorðabókini*. Umframt stavseting ásetur orðabókin teknseting, bending, kyn og sjálvt stavraðið. *Stavsetingarorðabókin* er grundað á *Føroyska orðabók*, ofta nevnd *Móðurmálsorðabókin*. *Stavsetingarorðabókin* er ætlað at lýsa føroyskt nútíðarmál, og tí verða summi orð í *Móðurmálsorðabókini* sáldað frá, m.a. ávís orð úr kvæðamáli, og onnur nýggjari orð, sum ikki eru skrásett í *Móðurmálsorðabókini*, verða løgd aftur at *Stavsetingarorðabókini*. Ein ritstjóri á málstovuni varðar av orðabókini saman við einum fylgibólki, sum Málráðið setur.

Ritstjórnin hevur gjøgnumgingið uml. 65 000 orð. Talan er um úrval úr *Føroyskari orðabók* og nøkur gerandisorð úr nútíðarmáli, sum eru løgd inn afturat. Tilfarið verður gjøgnumlisið, rættað og nøkur orð verða løgd afturat. Tilfarið fer til rættlestur í 2023.

***SignWiki Føroyar***

Á fíggjarlógini fyri 2022 vórðu 100 000 kr. játtaðar til menning av føroyskum teknmáli, og fyri ta játtanina vórðu Edny Poulsen og Eyðgunn Hansen settar í verkætlanarstarv at dagføra føroysku teknmálsorðabókina *SignWiki Føroyar*, sum er tøk á www.fo.signwiki.org. Edny og Eyðgunn eru útbúnir teknmálstulkar, og báðar hava drúgvar royndir við tulking, undirvísing og orðabókaarbeiði. Endamálið við orðabókini er at miðsavna og varðveita teknmálsliga orðfeingið, ella *teknfeingið*, sum deyv í Føroyum hava ment sínámillum og í samspæli við grannar okkara í Norðurlondum. Í føroyska teknmálinum eru málføri eins og í talumálinum, og teknmálsorðabókin virkar við til, at hetta fjølbroytnið verður skjalfest og stimbrað. Orðabókin skal vera brúkaravinarlig hjá deyvum og hoyrandi, sum vilja læra seg at samskifta á føroyskum teknmáli, og hetta verður gjørt við at leggja dagførdar films- og ljóðupptøkur aftur at øllum leitorðum. Harumframt greiðir hvørt uppslag frá, hvussu og hvar hondin verður hildin, tá ið teknið verður gjørt.

Verkætlanin hevur harumframt fingið stuðul frá Mentamálaráðnum til orðabókagerð, og henda upphæddin verður brúkt til høli og neyðuga útgerð at gera upptøkur í høgari góðsku. Verkætlanarstørvini og stuðulin hava gjørt tað gjørligt at leggja fleiri tekn aftur at orðabókini, men arbeiði við orðabókum krevur áhaldandi dagføringar, og tí verður tørvur á, at føroyska teknmálið framhaldandi fær høga raðfesting.

***Eftirmeting av Málráðnum***

Í málráðslógini frá 2012 § 10, stk. 3 stendur, at "Landsstýrismaðurin skal eftir 3 árum leggja fyri Løgtingið frágreiðing um, hvørt lógin virkar eftir ætlan, og kanna um til ber at áseta reglur um Málráð, Staðarnavnanevnd og Navnanevnd í somu lóg." Í 2016 varð ein eftirmeting gjørd, men hendan varð ikki løgd fyri Tingið, av tí at hon ikki varð mett at lúka krøvini til eina hóskandi eftirmeting. Mentamálaráðið hevur síðani vent sær til Málráðið við tí í hyggju at gera eina nýggja, tíðarhóskandi eftirmeting. Í hesum høpi er umráðandi, at syrgt verður fyri einum gevandi og fullgóðum eftirmetingarleisti, og at nøktandi fígging verður játtað, so arbeiðið kann gerast til lítar. Málráðið hevur í heyst í tveimum førum boðað Mentamálaráðnum frá, at tað gjarna vil hava eina nýggja eftirmeting gjørda og bíðar eftir, at greiða verður fingin á, hvussu eftirmetingin skal formliga skipast og fíggjast.

***Hendingar í 2022***

Í 2022 kom í lag, at forkvinnan fær fasta mánaðarliga samsýning.

Eitt fólk varð sett í verkætlanarstarv at skipa fyrisiting á málstovuni, sum m.a. ber í sær, at Málráðið verður partur av Landsneti, og at málstovan fær Skjalhald. Hetta er neyðugt, so Malráðið sum almennur stovnur kann halda góðan fyrsitingarsið og geva alment innlit í viðgerðir og tilgongdir, um biðið verður um tað.

Á móðurmálsdegnum 25. mars varð skipað fyri kahoot-kapping, har fleiri enn 800 fólk tóku lut. Í tí sambandi var málsligi ráðgevin í Góðan morgun Føroyar og kunnaði um dagin.

15. desembur varð ársins orð kosið í beinleiðis útvarpssending, og tað gjørdist *stuttflutt(ur)*. Orðið varð kosið í beinleiðis útvarpssending burtur úr einum úrvali av góðum boðum frá lurtarum hjá *Góðan morgun Føroyar*. Tað er Lena Reinert, limur í Málráðnum, ið hevur smíðað orðið, og ein áhugaverd samrøða við Lenu er at hoyra her. Hetta lýsingarorðið bendist sum onnur í samsvari við navnorðið, sum tað lýsir, t.d. *stuttfluttar matvørur* og *stuttflutt innbúgv*.

***Roknskaparárið 2022***

Játtanin fyri 2022 var kr. 1.591.000, og útreiðslurnar vóru kr. 1.590.111. Sostatt var eitt lítið avlop upp á kr. 889. Av játtanini eru kr. 100.000 oyramerktar til menning av teknmáli. Niðanfyri er yvirlit yvir játtan og útreiðslur á teimum ymisku kontunum:

| | | Játtan | Útreiðslur |
|---|---|---|---|
| 11 | Lønir | 1.433.000 | 1.333.500 |
| 14 | Keyp av vørum og tænastum | 55.000 | 139.468 |
| 15 | Keyp av útbúnaði | 20.000 | 33.481 |
| 16 | Leiga og viðlíkahald | - | 660 |
| 71 | Innanhýsis flyting millum stovnar | 83.000 | 83.002 |
| | | **1.591.000** | **1.590.111** |